## Tveir flogvallir mugu til

- Tað fer ikki at gera flogferðsluna meira regluliga, at flogbreytin í Vágum verður longri. Skal flogsambandið verða meira álítandi, er neyðugt at hava tveir flogvallir í Føroyum, sigur Magni Arge (myndin), stjóri í Atlantsflogi við Útvarpið. Atlantsflog skal hava nýggj og størri flogfør, og tí er neyðugt, at flogbreytin verður longri. - Men at flogbreytin verður nakrar hundrað metrar longri, fer ikki at hava við sær, at flogferðslan verður meira reglulig, sigur hann. Magni Arge sigur, at skal flogsambandið liva upp til tey krøv, ið nútíðar samfelagið krevur, so er neyðugt at hugsa longur enn til at leingja eina flogbreyt, og sipar til, at neyðugt verður við meira enn einum flogvølli í Føroyum.




## Strømegg og Ruth nýggjan túr

Hirtshals: Í gjár fóru Ruth og Strømegg nýggjan túr. Ruth kom aftur í dag úr Týsklandi har hon hevur landað. Bátarnir fiska sild. Um ikki so langa tíð fara teir at fiska makrel. Isafold og Beinur liggja inni í løtuni, skrivar bkv.fo

# Náti og líri - feitir og les

**Nú farið er um líradag, og nátungatíðin er byrjað, er hetta samstundis seinasti møguleiki hjá monnum at veiða ungfugl, sum enn ikki er farin til havs. Seinni í heyst verður loyvt at skjóta lomviga, men tann veiðan kann ikki samanberast við nátaveiði, sum gongur fyri seg á báti um mánaðarskiftið august/ september**

FUGLAVEIÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Farið er um líradag, og nú eru menn farnir at rigga seg til at taka nátungar á sjónum. Onkur hevur longu verið fyrsta túrin, og vit hava frætt um bátar, sum longu í gjár fingu út við 150 nátar.

Hetta er ein spennandi tíð hjá teimum, sum dáma at fáast við fuglaveiði. Dagarnir kunnu vera langir og strævnir, um nógv verður lagt fyri, og nógvur fuglur verður tikin og skal fáast til høldar.

### Líri minni kendur

Líradagur var týsdagin 26. august. Hetta er dagurin, tá menn plagdu at draga líra á plássum, har skrápur, sum er hin gamli fuglurin, byggir reiður. Skrápur reiðrast í holum millum urðagrót og holum, sum hann grevur inn í grasbakkan ella moldina.

Ymsastaðni kring landið verður líri tikin, men henda veiða er ikki so vanlig sum nátaveiða. Nógv minni er til av skrápi sum búfugli í Føroyum enn av havhesti, sum reiðrast í berginum at kalla um alt landið.

Líri verður vanliga drigin upp úr holuni við króki, sum er festur á ein stívan og boyggiligan jarntráð. Verður fuglurin tikin á nátt, sum er meira vanligt, tá ið tað líður eitt sindur longur út, verður gingið við lummalykt eftir urðagróti og á grønum blettum, sum eru millum urðagrótið.

Mong hava ongantíð sæð ein livandi líra, tí hesin kemur bert út úr holuni, tá kvøldarmyrkrið kemur. Tá kemur hann út úr tryggu holu síni at taka ímóti skrápinum - gamla fuglinum - sum kemur aftur av havinum við føði. Tey plaga at siga, at líri eisini kemur út í myrkrinum at læra seg at flúgva. Tá skrápurin er komin aftur at landi um midnáttarleitið, fara gamli fuglurin og ungin innaftur í holuna.

Summi kvøld eru fleiri lírar úti enn onnur kvøld.

Á teimum plássum, har líri verður veiddur, er hetta ein spennandi tíð.

Lítið hoyrist um líraplláss og líraveiði, men tað, sum vit vita um, eru skúvoyingar millum teir ídnastu at veiða líra.

Støðini, har skrápur reiðrast, verða líkasum hildin eitt sindur duld, so eingin óviðkomandi ger seg inn á fuglabølið.

Tú skal vera rímiliga kønur og kenna fuglin hampiliga væl, um tú við eini lummalykt í myrkri skal síggja mun á búfuglinum og unganum, tá hesin er vaksin.

Minnist eg rætt, plaga menn at siga, at lírin er svartur omaneftir bakinum, meðan skrápurin skýggir moyrreyður ella brúnligur.



*Ein góður nátadagur. Lastin er full, og tað eru kassarnir eisini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Umráðandi er, at búfuglurin ikki verður tikin.

### Havhestatíð

Hetta er eisini tíðin, tá nátungin av álvara byrjar at ressast í reiðrinum og hevur hug at royna sínar veingir, til hann at enda flýgur út av rókini.

Nátaveiða er meira kend um alt landið enn líraveiða, og í hesi tíðini plaga hópur av bátum og monnum kring landið at taka sær upp í tunnuna til veturin, sum stundar til – og summir sláa seg saman og royna at tjena sær nakrar krónur.

Hugsandi er, at menn, sum hava høvi til tess, nú samfelagið er vorðið so dýrt at liva í við høgum olju-og matvøruprísum, ikki verða minni ágrýtnir, nú hendan tíðin er, og høvið er at tjena sær nakrar eyka krónur.

Eitt sindur ymiskt er ár undan ári, nær besta nátatíð er. Hetta kann vera tengt at veðrinum, tá tíðin nærkast, men ivaleyst hevur tað størstan týdning, nær gamli fuglurin er lagstur, og hvussu umstøðurnar hjá unganum at búnast nú einaferð hava verið.

Summi ár fæst nátungi á sjónum longu fyrstu dagarnar eftir 20. august, og onnur ár kanst tú fara ein langan túr 26. august – og ongan fugl síggja á sjónum.

*Ein nátadagur í góðum veðri kann illa sammetast við nakað annað*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Nú 28. august er í dag, er greitt, at nátungin so smátt er byrjaður at ressast á rókini og hevur hug at royna sínar veingir. Náttúran í fuglinum sigur honum, at tíðin er komin og at rókin, har hann so tryggur hevur sitið og bíðað eftir føði, ikki er nakað blívandi stað longur. Hugurin dregur út á hav, og nú er hann nóg búgvin til at søkja sær føðina sjálvur.

Ilt er kanska at siga, hvønn týdning eitt lot upp í bergið hevur ein slíkan dag, men óhugsandi er ikki, at tað kann viðvirka til, at seinasta stigið út av rókini verður tikið.